# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðfeingisdeildina G1

Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi og avbjóðandi umhvørvi, har grundleggjandi sjúkrarøkt skal samantvinnast við háteknologi, so er møguleikin her. Okkum tørvar sjúkrarøktarfrøðingar til føst størv og avloysarastørv frá 1. oktober 2007, - ella so skjótt til ber. Starvsbrøk eftir avtalu.

Bráðfeingisdeildin er ein heild við fleiri ymiskum funktiónum, sum umfata intensiva deild, viðrakning, skaðastovu, bráðmóttøku, dagskurð og læknavaktina.

Tú kemur, alt eftir tørvi og førleika, at hava ymiskar arbeiðsuppgávur á deildini, og ta fyrstu tíðina er talan í høvuðsheitum um tað intensiva økið.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- góða innleiðslu og skipaða upplæring
- fjølbroytt arbeiði og nógvar avbjóðingar
- starvsfelagar við góðum fakligum førleika
- starvsfelagar, ið ynskja at arbeiða í einum mennandi umhvørvi
- ein spennandi arbeiðsdag við góðum møguleika fyri egnari menning

**Tú hevur:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í viðgerð og røkt av sjúklingum við intensivum og bráðfeingis tørvi
- medferðarkenslu og kanst skjótt skapa tær yvirlit
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og kreativt
- hug til fakliga menning og avbjóðingar
- góð samstarvsevni og ert fleksibul
- eitt opið og jaligt sinni
- møguleika at arbeiða í skiftandi vaktum, dag-, kvøld- og náttarvaktum
- teldukunnleika
- hug og vilja at arbeiða við egnari fakligari menning og førleika
- ábyrgdarkenslu fyri at skapa góðan trivna á deildini

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja 304500 til Margit Stórá, deildarleiðara á G1, lokal 5811, mast@lsh.fo ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, naina@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 9. september 2007 kl.12.00

## Læknaskrivari til Skurðdepilin

Ert tú læknaskrivari og hevur hug til at arbeiða í einum spennandi, tvørfakligum umhvørvi, so er hetta møguliga nakað fyri teg.

Læknaskrivaraarbeiðið á Skurðdeplinum umfatar: Ortopædi, Parenkymkirurgi, Urologi, Plastikkirurgi, Gyn./obs. Hettar starvið er leyst at søkja til setan 1. oktober 2007 ella eftir avtalu.

Á skurðdeplinum eru vit 17 læknaskrivarar.

Vit kunnu bjóða eitt spennandi og avbjóðandi starv, har tú kemur at seta tín dám á arbeiðsøkið saman við verandi læknaskrivarum at virka fyri einum høgum tænastustøði. Upplæring verður givin í teimum telduskipanum, sum verða nýttar.

**Uppgávurnar eru sera fjølbroyttar, so sum:**
- vera virkin partur av nýggju Talgildu Heilsu Skipanini
- skriva journalir
- avgreiða fyrispurningar frá sjúklingum
- ymsar umsitingarligar uppgávur
- vera við til at útbúgva læknaskrivaranæmingar

**Vit ynskja ein læknaskrivara, ið:**
- hevur læknaskrivaraútbúgving
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- hevur góð samstarvsevni
- tolir broytingar
- hevur teldukunnleika

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Helenu Gerfort, leiðandi læknaskrivara, lokal 5105.

**Umsóknarfreistin** er 19. september 2007 kl. 12.00

## Leiðandi læknaskrivari

Á Skurðdeplinum er eitt fulltíðarstarv sum leiðandi læknaskrivari leyst at søkja til setan 15. oktober 2007 ella eftir avtalu.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- kt-førleika

**Eyka førleikakrøv til leiðandi læknaskrivara:**
- leiðslu- og menningarhugað
- leiðsluútbúgving og royndir er ein fyrimunur
- hevur evni at raðfesta og ætlanargera arbeiðið

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Helenu Gerfort, leiðandi læknaskrivara, lokal 5105.

**Umsóknarfreistin** er 19. septembur 2007 kl. 12.00

## Onnur størv

(sí meira á www.lsh.fo)

**Ergoterapeutur til Somatisku deild**
Umsóknarfreistin er 27. august 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar og Heilsurøktarar/pleygarar til Psyk. D2**
Umsóknarfreistin er 31. august 2007 kl. 12.00

**Sjúkrarøktarfrøðingar ella Heilsurøktarar/pleygarar til Psyk. depilin**
Umsóknarfreistin er 31. august 2007 kl. 12.00

**Pedagogur til Barnadeildina B5**
Umsóknarfreistin er 3. september 2007 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

· er sjúklingurin í miðdeplinum
· eru umleið 200 seingjarpláss
· eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
· eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
· eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
· er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo

W W W . S O S I A L U R I N . F O